

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 11 - 2011

# Spennandi boring verður av ongum

Ætlanin var, at BG og tess samstarvsfeløg skuldu fremja eina spennandi verkætlan við at bora tann fyrsta leitibrunnin ígjøgnum gosfláirnar har vesturi í Noregshavinum. Men tað verður av ongum, tí nú hevur BG latið leitiloyvið innaftur. Marianne Eide, stjóri í BG, sigur við Offshore.no, at feløgini í samstarvinum hava tikið avgerðina eftir at hava hugt eftir úrslitinum av tekniskum kanningum. Eftir ætlanini skuldu BG og samstarvsfeløgini Eon, Ruhrgas og Spring bora ein leitibrunn ígjøgnum tað sokallaða sub-basaltið har vesturi í Noregshavinum. Enn er eingin leitibrunnur boraður í gjøgnum gosgrótið har vesturi í Noregshavinum, og tí bíðaðu fólk í spenningi eftir teirri fyrstu royndini, sum altso nú verður av ongum. Ígjøgnum Force, sum er eitt samstarv millum oljuvinnuna og norska oljustýrið, arbeiða serfrøðingar við at fáa greiði á, hvørjir møguleikar eru undir lavafláunum í Noregshavinum. Ein bági er, at fláirnar við gosgróti avmarka tað, sum kann fáast burtur úr seismiskum kanningum.